# Jólacafé og tombola

KFUK-SKÓTAR
*Tíðindaskriv*

Jóla-café og tombola í sjónleikarahúsinum í Havn í desember mánaði

Um ársskiftið 2002/3 verður tann 20. heimsjamboreein við 30.000 skótum úr øllum heiminum hildin í Thailandi. Jamboreein er fyri skótar, sum eru millum 14 og 17 ár. Nakrir føroyskir skótar hava teknað seg til hesa jamboreeina.

Jamboree hevur verið ymsa staðni í heiminum 4. hvørt ár síðani í 20'unum og føroyskir skótar hava verið við á teimum flestu. Seinast var Jamboree í Chile, har vóru 14 føroyskir skótar við. Á leguni vóru 34.000 skótar úr 184 londum.

Hetta er ikki nøkur frítíðarferð, sum ein kann fara saman við mammu og pápa sínum. Men ein ferð, har ein sum skóti upplivir Thailand og Malaysia, - á Jamboree - í frumskógi og heima hjá einum asiatiskum skótahúski.

Jamboree er eitt gamalt indianskt orð, sum merkir friðarorrusta. Baden-Powell, stovnarin av skótarørsluni valdi sær hetta orðið til at lýsa eina stóra skótalegu, og fer ein á eina jamboree í dag, hevur ein møguleika at hitta skótar úr fleiri enn 180 londum og uppliva tær ymsu mentanirnar eisini. Ein fær vinir fyri lívið, samstundis sum ein upplivir, hvussu eins skótahugsjónin er um allan heim.

Teir 12 dagarnar jamboreeini varar verður m.a. heik, har gist verður á økinum. Eitt afturvendandi tiltak er »The Global Development Village« har ein kann verða við í virksemi viðv. heilsu, umhvørvi, fólkarættindum, friði og fólksligari fatan. Ein dag verður skótahjálp í Thailandi. Av øðrum virksemi kann nevnast: Water Sports, Our Heritage, Tournament, City of Science and Technology. Nýggjárið verður eisini eitt av hæddarpunktunum.

Leguøkið verður við Sattahip, sum er 180 km í ein landsynning úr Bangkok. Sjálv legan verður á einum náttuруvøkrum øki við fjallalendi á aðrari síðuni og einari langari hvítari sandstrond á hinari.

Farið verður úr Føroyum 26. des. 2002 og komið verður aftur 20. jan. 2003. Jamboreein er frá 28. des. 2002 til 8. jan. 2003 Aftaná leguna verður skipað fyri einum áhugaverdum túri í Thailandi og Malaysia.

Tað er rættiliga kostnaðarmikið at fara so langa leið av stað, og føroysku skótarnir ganga allir í skúla og hava ikki nakra fasta inntøku. Teir eru tí sjálvir farnir í gongd við at skipa fyri ymiskum tiltøkum, sum vónandi skuldu givið teimum eitt sindur av inntøkum. Teir hava havt køkutombola í FK í Havn og handlinum hjá Eli.

Hesa vikuna og nakað inn í desembermánað skipa skótarnir fyri »jóla-café« í sjónleikara-húsinum í Havn. Her selja teir kaffi, te, kakao, pop-top, rísalamang, kleynur, bollar, atgongumerki til sjónleikin »Ísbjarnirnar« o.a. Eisini hava teir eitt tombola við nógvum ymiskum gávulutum. Opið er hvønn gerandisdag millum kl. 15 og 18, leygardagar er opið kl. 13 - 16. Øll eru vælkomin inn á gólvið. Fleiri fyritøkur og handlar í Havn hava stuðlað við vinningum til tombola, teir eru: FK í Hoyvík, Føroya Bjór, P/f Hjalmar Jacobsen bókh., H.N.Jacobsens Bókahandil, P/f Maria Poulsen, MBM, P/f Poul Hansen, P/f Poul Michelsen, Skálabúðin og Thomas Dam á Hálsi.

# Vinnunevndin samd um suðuroyarskipið

**Ein samd vinnunevnd tekur undir við uppskotinum um at byggja nýtt suðuroyarskip fyri í mesta lagi 305 milliónir krónur.**

SUÐUROYARFERJA
*Magnus Dam*

Allir limirnir í Vinnunevndini taka undir við at geva landsstýrismanninum í samferðslumálum, Bjarna Djurholm, hemild til at byggja nýtt suðuroyarskip.

Vinnunevndin hevur gjørt skjótt av, og málið hevur bert verið viðgjørt á einum fundi. Týsdagin legði nevndin álit fram í málinum, og har sæst, at allir teir sjey limirnir uttan fyrivarni taka undir við lógini, sum loyvir landsstýrismanninum at gera sáttmála um at byggja nýggja skipið.

Tað er bert Kári P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum, sum hevur serstakar viðmerkingar til lógaruppskotið. Hann sigur, at hann var ivasamur um avgerðina at byggja so stórt skip – men nú er so langt útliðið, at tað vendist ikki aftur. Hann leggur afturat, at tað er umráðandi, at íløgurnar í nýggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði verða gjørdar, meðan nýggja skipið verður smíðað, so havnin er liðug, tá skipið er liðugt.

Lógin gevur Bjarna Djurholm heimild at gera sáttmála við eina skipasmiðju um at byggja eitt skip fyri í mesta lagi 305 milliónir krónur. Hvør endaligi kostnaðurin verður, er kortini ikki greitt enn, tí enn er eingin sáttmáli gjørdur.

Fleiri skipasmiðjur í Evropa og úr Asia hava bjóðað uppá arbeiðið, og Strandferðslan situr í løtuni og viðger innkomnu tilboðini. Tá ið hetta arbeiðið er liðugt, verða nakrar skipasmiðjur valdar út, sum nærri samráðingar skulu verða við. Úrslitið av hesum samráðingunum fer at vísa, hvør fær stóra ordran at byggja føroyingum nýtt suðuroyarskip.

Ætlanin er at seta 95 milliónir krónur av á fíggjarlógini fyri næsta ár og á leið somu upphædd tey bæði eftirfylgjandi árini – alt eftir hvør endaligi kostnaðurin verður.


Ljósir HTH køkar
í Norðurlendskum sniði





Keyp nýggjan køk fyri gamlan prís!

Keyp køkin áðrenn 20. desember og fá køkin leveraðan áðrenn 1. februar 2002

Støkk inn á gólvið og síggj stóra úrval okkara

...tú fært tað munandi betri hjá HTH

HTH Køksmiðstøðin Á Hálsi • FO 100 Tórshavn
Tel. 314949 • Fax 311330 • www.hth-kokar.com






Bókin um føroyska fótbóltslandsliðið í HM-undankappingini 2000/2001.
Ein øðrvísi føroysk fótbóltsbók. Hurðin verður gloppað innanfrá
og ljós verður varpað á tað, sum fer fram handan leiktjøldini.

Fæst í sølubúðunum um alt landið
fyri bert 290,-





Hevur tú hug at rætta línum landsmonnum á Hotel Tórshavn eina hond, kanst tú stuðla tiltakinum við t.d. at tekna teg til eina fasta flyting um mánaðin áljóðandi 25 - 50 kr.

Virkir, feløg og stovnar eru eisini hjartaliga vælkomnir at geva gávur

Grunnurin ynskir øllum føroyingum eini gleðilig jól og eitt heilsuberandi nýggjár

Trivnaðurgrunnur fyri Sjúklingahotellið Tórshavn
konto í Føroya Sparikassa nr. 9181-134.164.4




Vágatunnilin:

# Koma ígjøgnum í aðru viku í januar

**Arbeiðið við undirsjóvartunlinum undir Vestmannasund gongur strúkandi. Væntandi ber til at sleppa ígjøgnum undir sundið í aðru viku í januar. Stjórin í partafelagnum Vágatunnilin leggur doyðin á, at trygdin verður í lagi, tá undirsjóvartunnilin letur upp fyri ferðslu**




*Nú líður væl at bora undir Vestmannasundi, tí nú eru bara 275 metrar eru eftir. Myndin er ikki heilt nýggj, og tí sigur hon, at 293 metrar eru eftir at bora. Stjórin í partafelagnum Vágatunnilin, Dávid Reinert Hansen, hevur boðað frá, at ein arbeiðsbólkur skal fyrireika eina tilbúgvingarætlan*

UNDIRSJÓVARTUNNILIN
*Stefan í Skorini*

Nú eru bara nakrir heilt fáir metrar eftir, til menn eru lidnir at bora holið undir Vestmannasund. Tilsamans eru arbeiðsmenninir komnir ígjøgnum 93% av tunlinum. Væntandi møtast bæði liðini av arbeiðsmonnum miðskeiðis undir Vestmannasundi í aðru viku av januar.

Tunnilin verður 4877 metrar til longdar og einir 275 metrar eru eftir at bora.

Í seinastu viku vórðu 57,5 metrar av gróti skotin burtur undir sundinum. Seinastu fýra vikurnar hevur tað gingið skjótt framá. Í miðal hava arbeiðsmenninir ota seg 96 metrar longur fram hvørja viku.

Borað verður báðumegin, og tí gongur skjótari nú enn at byrja við. Fyrsta skotið varð latið av tann 28. september í 2000 í Leynum. Fyrsta skotið í Vágunum varð latið av 27. februar 2001.

Hermann Lindberg, ið stendur fyri arbeiðnum hjá NCC at bora, sigur, at tað gongur væl. Teir eru tvær vikur frammanfyri upprunaligu tíðarætlanina, hóast arbeiðið lá stilt í fýra vikur, tá Føroya Arbeiðarafelag var í verkfalli. Arbeiðið kundi tískil verið hálvanannan mánaða frammanfyri, um verkfallið ikki hevði órógvað.

### Trygdin í lagi

Stjórin í P/F Vágatunlinum, Dávid Reinert Hansen, sigur, at trygdin í undirsjóvartunlinum er í lagi. Endamálið er, at tað verður eins trygt at koyra í undirsjóvartunlinum sum á einum vanligum vegi.

Partafelagið, ið tekur sær av arbeiðnum, hevur tikið stig til at gera eina tilbúgvingarætlan saman við Føroya Landfúta, Landsverkfrøðinginum, Kvívíkar kommunu og Sandavágs kommunu.

Ætlanin hevur frá byrjan verið, at trygdarreglurnar skulu vera tær somu í vágatunlinum sum í teimum norsku tunlunum. Sambært reglugerðini verða eldsløkkjarar settir upp við 250 metrum ímillum hvønn. Somuleiðis verður ein neyðtelefon fyri hvørjar 500 metrar. Tær hava beinleiðis samband við alarmsentralin, ið kann steingja tunnilin við sjálvvirkandi bummum báðumegin.

Eisini verða viftur settar upp í tunlinum. Tær geva fríska luft, meðan vanlig ferðsla er í tunlinum, og tær kunnu blæsa við stórari megi, um eldur er í.

### Fartelefon og útvarp

Dávid Reinert Hansen væntar, at tað verður koyrandi ígjøgnum í juni 2003. Hetta hevur verið ætlanin allatíðina, og tíðarætlanin heldur.

Tá liðugt er at bora, verður farið undir at reinsa tunnilin. Hetta arbeiðið fer at taka einar tveir mánaðir. Síðani verður farið at gera sjálvan vegin og at tekja tunnilin, har tað lekur.

Tá vegurin er gjørdur, verða háspenningslinjur og annað lagt inn í tunnilin. Til stóra gleði fyri tey, ið hava telefonitis, verður møguleiki at tosa í fartelefon inni í tunlinum, tí antennur til GSM verða lagdar inn. Harumframt verður eisini møguleiki at hoyra útvarpið, tí sendarar til FM verða settir upp. So eingin orsøk er at koyra skjótari gjøgnum tunnilin, tá tíðindini eru á skránni.

# Stórur matvøruhandil á Norðskála

**Jaspur Johannesen úr Havn er farin undir bygging av einum nýggjum matvøruhandli við Norðskála. Bygningurin er 700 fermetrar og verður størsti matvøruhandil í Eysturoynni**

HANDIL
*Stefan í Skorini*


*Í hesum bygninginum við Norðskála verður ein matvøruhandil, ið helst er tann størsti í Eysturoynni*
Mynd: Jens Kr. Vang

Tey flestu, ið koyra framvið Norðskála, munnu undrast á tann stóra bygningin, sum er reistur beint við landsvegin.

Jaspur Johannesen er maðurin aftanfyri henda bygningin. Hann væntar, at bygningurin verður innilokaður í hesi vikuni, og latið verður upp fyri viðskiftafólkum um mánaðarskifti februar og mars. Teir fóru at grava út í vár, so tað hevur tikið eitt lítið ár at byggja.

Handilin verður 700 fermetrar, og Jaspur heldur, at hetta er størsti matvøruhandil í Eysturoynni.

### Hevur royndir

Jaspur hevur drúgvar royndir innan sølu av matvøru. Hann var í fleiri ár stjóri fyri Bónus handlarnar í Føroyum.

Nú fer hann so undir at hava egnan handil. Hann væntar, at grundarlagið fyri viðskiftafólki er til staðar, tí hann roynir at fanga kundar úr einum stórum øki í Sundalagnum. Enn er ógreitt, hvussu nógv starvsfólk fara at arbeiða í handlinum, tí tað veldst um, hvussu nógv fólk velja at gera síni innkeyp her.

Jaspur fer ikki avdúka enn, hvussu handilin fer at eita.